Henrik Gerster, landsliðsvenjari:

# - Tveir harðir dystir

**Føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Gerster, var samanumtikið væl nøgdur við dystirnar móti íslendsku manningini, ið var væl sterkari, enn hann hevði væntað**

LANDSLIÐSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ein nøgdur landsliðsvenjari, ið vit fingu orðið á eftir seinna dystin móti íslendingum á Hálsi sunnukvøldið. Henrik Gerster helt, at føroysku spælararnir høvdu lært nógv av fyrra dystinum, sum teir megnaðu at rætta í seinna dystinum.

### Dystarvenjingin manglar

- Í dystinum á Eiði eri eg sum heild nøgdur við verjuna hjá okkum, meðan vit ikki eru nóg neyvir í álopspartinum. Í dystinum her á Hálsi eru vit nógv betur við, og serliga eri eg væl nøgdur við avrikið hjá mínum monnum í seinna hálvleiki, segði Henrik Gerster.

Føroyski landsliðsvenjarin helt, at tað sást týðuligani, at føroysku spælararnir manglaðu dystarvenjing. Ikki minst sást hetta aftur í neyvleikanum á skotroyndunum, og Henrik Gerster helt eisini, at tað sást aftur á leikferðini, har føroyingarnir høvdu ilt við fylgja við íslendingunum í tempo. Íslendska kappingini endaði fyri góðari viku síðani, og tí eru íslendsku spælararnir í góðari dystarvenjing.

- Eg má eisini viðganga, at íslendska liðið er væl sterkari, enn eg hevði roknað við. Eg kendi nakrar av spæarunum frammanundan, men eg helt ikki, at liðið var so sterkt, sum tað nú einaferð er. Hetta eru alt spælarar, sum hava spælt í íslendsku kappingini, ið júst er endað, og eg havi frætt, at okkurt um níggju av hesum spælarunum eru í ferð við at skriva sáttmálar við útlendsk feløg, greiddi Henrik Gerster frá.

Føroyski landsliðsvenjarin segði, at tá ið talan í veruleikanum var um eitt íslendskt ligalandslið, sum var so sterkt, so má staðfestast, at tann íslendska kappingin er sera sterk.

### 10 vikuskiftisvenjingar undan Challenge Trophy

Komandi vikuskifti skulu føroysku spælararnir til eina fysiska roynd, og síðani fáa teir eina venjingarskrá, ið teir skulu fylgja miðvíst fyri at gerast betur fyri kropsliga.

Sambært Henrik Gerster verður nú arbeitt víðari fram móti Challenge Trophy kappingini í Írlandi í heyst, sum føroyska manslandsliðið skal taka lut í, og eitt nú er ætlanin, at landsliðshópurin skal savnast til 10 vikuskiftisvenjingar, áðrenn farið verður til Írlands.

Spurdur um ætlanir vóru um nakrar aðrar venjingardystir, segði Henrik Gerster, at tað var tað ikki í verandi løtu, men kanska fór liðið ein túr til Noregs at spæla móti onkrum klubliði har. Annars er ætlanin, at tá ið føroyski hópurin fer til Challenge Trophy í heyst, verður skipað fyri eini venjingarlegu antin í Danmark ella Noreg ávegis til Írlands.




*Føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Gerster, var fegin um dystirnar móti íslendingum, men hann viðgekk, at mótstøðan var harðari, enn hann hevði væntað.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Tað var ógvuliga trupult hjá føroyska liðskiparanum Halgir Dahl Olesen og hinum føroysku spælarunum at berja seg gjøgnum sterku íslendsku verjuna, men tað gekk væl betur í dystinum í Havn enn í dystinum á Eiði.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

21.05.05 Føroyar-Ísland 18-39
22.05.05 Føroyar-Ísland 27-36

# Framúr sterkir íslendingar

**Føroyska manslandsliðið hevði neyvan væntað, at íslendska ligalandsliðið, sum teir dystaðust við um vikuskiftið, var so sterkt, sum tað í veruleikanum var. Serliga í fyrra dystinum millum londini bæði, kom hetta óvart á føroyingarnar**

LANDSDYSTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Henrik Gerster, landsliðsvenjari, segði við Sosialin leygardagin, at eftir hansara tykki høvdu føroyingar ein møguleika at basa íslendska ligalandsliðnum, um okkara menn høvdu ein góðan dag. Tá mundi føroyski landsliðsvenjarin neyvan vita, hvussu sterkt íslendska liðið, ið vitjaði í Føroyum, var.

### Spældu føroyingar tunnar

Lat tað verða sagt beinanvegin. Íslendska liðið var snøgt sagt framúr gott, og tíverri vóru tað alt ov fáir føroyskir áskoðarar, ið høvdu lagt leiðina antin norður til Eiðis leygardagin ella niðan á Háls sunnudagin at síggja eina uppvísing í, hvussu hondbóltur skal spælast, tá ið hann er bestur.

Íslendska kappingin endaði fyri einari viku síðani, at tað var týðuligt, at íslendsku spælararnir vóru í góðari dystarvenjing. Tað sama kann tíverri ikki sigast um okkara leikarar, tí hjá teimum var neyvleikin og bóltfølingin als ikki tann sama, sum hon hevði verið, um føroyska kappingin hevði verið í gongd nú.

Eisini sást hetta aftur í leikferðini, tí tá ið Ísland setti ferð á álopsspælið hjá sær, megnaðu okkara spælarar als ikki at fylgja við, og við nógvari ferð spældu íslendingar føroysku verjuna tunna, og tað gekk lætt hjá teimum at koma til opnu málmøguleikarnar. Teir báðir føroysku málverjarnir, Levi Nybo og Lars Black, høvdu úr at gera, og í flestu førum vóru teir eisini prísgivnir.

### Gekk betur í Havn

Í fyrra mansdystinum, sum var á Eiði leygardagin, hekk einki saman hjá føroyingunum. Av tí sama gjørdist talan eisini um eitt stórtap, 18-39, og tað kundi als ikki góðtakast. Í hesum dystinum sást ógvuliga væl, at føroyska liðið ikki var serliga væl samanspælt, og óneyðugu feilirnir, ið okkara menn gjørdu í álopspartinum, vóru nógvir í tali.

Tað skerst heldur ikki burtur, at føroyska verjan í dystinum á Eiði var alt ov friðarlig, og tú saknaði, at føroysku menninir fóru út at berjast við íslendsku leikararnar. Í slíkum altjóða dystum er neyðugt, at tú fert í harðar nærdystir, og sum spælir skalt tú rokna við at fáa nøkur blá merkir. Men á Eiði var føroyska verjan alt ov lítið ágrýtin, og tað sigur ikki so lítið, at føroyingarnir í fyrra dystinum einans fingu eitt gult kort tíðliga í dystinum, og eina útvísing beint fyri leiklok fyri at brúka munn. Tað er snøgt sagt ikki nóg gott, tí í einum altjóða mannfólkadysti eigur eitt lið altíð at fáa nøkur gul kort og nakrar útvísingar.

Tað tóktist tó sum um, at føroyska liðið hevði sett sær fyri at fáa uppreisn í dystinum í Havn sunnudagin, tí tá var gejsturin heilt ein annar, og í verjupartinum fóru føroysku spælararnir av álvara út í íslendsku spælararnar og bardust við teir, sum tað sømir seg.

### Fínur seinni hálvleikur

Besta avrikið hjá føroysku monnunum var seinni hálvleikur á Hálsi, sum føroyingarnir í veruleikanum vunnu við einum máli. Tá sást tú eitt sindur av skipaðum spæli, og eisini sást føroysku spælararnar tora at gera eina roynd at bróta seg ígjøgnum sterku íslendsku verjuna, og tað lukkaðist eisini í fleiri førum.

Tað skal tó sigast, at føroyski hálvleikssigurin var bygdur á eitt sindur tunt grundarlag, tí tað skerst ikki burtur, at íslendingar skrúvaðu niður fyri blussinum í seinna hálvleiki. Eitt nú skiftu teir málverjan í steðginum, og tað er einki at taka seg aftur í, at tað var stórur munur á teimum báðm íslendsku málverjunum.

Men føroyska avrikið á Hálsi var avgjørt góðkent, og tað man uttan iva eisini geva monnum blóð á tonna fyri at halda fram við miðvísu venjingini fram móti Challenge Trophy Cup í Írlandi í heyst.